## Kanna alifisk

Í dag kom ein maður hjá russisku myndugleikunum til Noregs at kanna viðurskiftini á teimum níggju alibrúkunum, sum hava fingið loyvi til at útflýta aldan laks til Russlands. Í norsku alivinnuni vita tey ikki rættiliga, hvat russiski eftirlitsmaðurin vil sleppa at síggja, og tað verður neyvan greitt fyrr enn fríggjadagin, tá alarafelagið skal hava fund við mannin. Alarafelagið hevur latið eftirlitsmanninum skrivstovuhølir í Tróndheimi til kanningarnar.

## Streym úr Íslandi

Á tingfundinum í morgin fer tingmaðurin Kári P. Højgaard at spyrja landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm, um møguleikarnar fyri, at Føroyar kunnu keypa bíliga elorku úr Íslandi. Tingmaðurin vísir á, at hetta kundi medvirkað til at skerja føroyska $CO_2$-útlátið. Tí spyr hann landsstýrismannin, um íslendingar hava møguleikar at selja føroyingum streym, hvat ein kaðal hevði kostað, og um partarnir hava tosað um slíkan handil.

# Báturin pussast og mast

**- Einaferð málaði eg eitt flogfar, sum eg hevði gjørt. Men tað bleiv ikki so pent, og tí ætlaði eg mær ikki at mála hetta, sigur 10 ára gamli, Eliesar Eið sum er ættaður av Hellunum. Hann er ein av 14 næmingum við skúlan í Oyndarfirði. Fyrrapartin í gjár høvdu teir eldru næmingarnir træsmíð**

SKÚLASMÍÐ

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Oyndarfjørður:** Hóast talan er um ein skúla, er lítil gangur og óljóð at hoyra.

Eingin næmingur er at síggja uttanfyri skúlan og heldur eingin er inni í stóru gongini. Hvørki næmingar ella lærarar.

Sum vit nærkast smíðstovuni skilja vit hví: Allir teir seks næmingarnir standa so konsentreraðir við borðini og hava sítt at takast við hesa løtuna. Her er ikki nógv tíð til fjant og fjas, og lærari teirra, Hallur ger sítt til at arbeiðið skal ganga skjótt og væl.

Onkur teirra ger ein lut sum helst endar undir einumhvørjum jólatræi í bygdini, meðan tveir av dreingjunum leggja seinastu hondina á eitt flogfar.

Ein teirra er skilamaðurin Eliesar Eið. Hann hevur beint lagt flogfarið frá sær, tí nú ætlar hann undir næstu uppgávuna.

*Fyrst má eg pussa bátin. Men eg ætli mær ikki at mála hann. Eg haldi at hann skal bara vera so sum hann er beint nú*

- Tú, Hallur. Kanst tú ikki rætta mær handa bátin. Hann stendur haruppi á hasum skápinum, sigur Eliesar við lærara sín.

Lærarin so ger. Gevur honum bátin, sum er næsta mál hansara henda dagin.

- Jú, tey eru ófør at arbeiða, slær Hallur fast.

Tað gongur tað sjón fyri søgn um, nú smíð stendur á tímatalvuni henda kalda desemberdagin í Oyndarfjarðar skúla.

### Fleiri uppgávur

Ein av teimum góðu lærugreinunum hjá hesum skilagóða hellumanninum er smíð.

- Mær dámar sera væl at saga, sigur Eliesar.

Tað var júst tað hann og teir eldru næmingarnir høvdu, tá vit vitjaðu Oyndarfjarðar skúla fyrrapartin í gjár.

Øll vóru tey í gongd við ymisk smíðarbeiði. Eliesar hevði tvær ætlanir sum hann ætlaði at fremja fyrst.

Tá hann var liðugur við tær, ætlaði hann sær undir ta triðju, sum var eitt rúmdarfar, og kanska ta fjórðu við.

Men fyrst mátti hann fáa bátin lidnan.

### Puss og mastur

Bátin átti hann ikki sjálvur, men ein eldri beiggi hansara sum kallast Frits.

Hetta er ein vakur bátur, ein fiskibátur helst: Stýrhúsið er aftan og ein stór mastur framman. Júst soleiðis sum dreingir ímynda sær at ein slíkur bátur skal síggja út.

Hóast Eliesar sjálvur ikki eigur bátin, so ætlar hann kortini at snøgga hann og gera hann ordiliga lidnan.

- Fyrst má eg pussa hann. Men eg ætli mær ikki at mála hann. Eg haldi at hann skal bara vera so sum hann er beint nú, greiður Eliesar frá.

*Hetta er okkurt slag av einum framtíðarflogfari*

Aftanfyri hann stendur lærarin Hallur og smílist. Hann veit, at áhugin fyri smíði og handalag hansara kemur ikki av ongum. Faðirin má onkursvegna hava lagt honum og eldra beiggjanum lag á!

- Og tá eg eri liðugur við tað, so fari eg eisini at skifta mastrina út. Hon er




## Dámar væl at svimja

Tá Eliesar ikki er í skúlanum spælir hann við vinmenn sínar.

Teir eru allir úr Oyndarfirði, men tá veðrið er gott, er tað bert eitt spæl at súkkla av Hellunum og yvir um til ta størru bygdina.

Eitt annað fast er kortini á vikutalvu hansara, og tað er svimjingin. Umframt tað at hann svimur tvær ferðir um mánaðin við skúlanum á Strondum, er Eliesar eisini virkin í svimjifelagnum Skeggjar í Gøtu.

Hetta dámar honum sera væl, og hann hevði so víst ætlað sær at luttikið í svimjikappingini sum um vikuskiftið verður í Klaksvík.

Tíverri fyri hann er ein stórur dagur hjá familjuni í Suðuroy um vikuskiftið. Hagar fara foreldrini, í hvussu so er mamman, og tí fer hann neyvan við til kappingina hesaferð.